Eldraráðið í Tórshavnar kommunu
Tórsgøta 21, 100 Tórshavn
eldrarad@torshavn.fo

# Eldraráðið 2021 – 2024

| | |
|---|---|
| Fundur: | Nr. 3 |
| Tíð: | 17-03-2022 klokkan 13 |
| Stað: | Tilhaldið í Tórsgøtu |

**Møtt:** Katrin Holm, forkvinna, Bjørghild Djurhuus, næstforkvinna, Julianna Klett, kassameistari, Petur Rouch, skrivari, og Marin Rasmussen, limur

**Fundarskrá:**

1. Eftirmeting av Ráðstevnuni í Norðurlandahúsinum 15. mars
2. Fyrireiking til fund við borgarstjóran 30. mars 2022
3. Góðkenning av fundarfrágreiðing frá seinasta fundi
4. Ymiskt

AD 1 Eftirmeting av Ráðstevnuni í Norðurlandahúsinum 15. mars

Vit vóru samd um, at Ráðstevnan í Norðurlandahúsinum var góð og gevandi. Alt samanumtikið var dagurin sera væleydnaður.

AD 2 Fyrireiking til fund við borgarstjóran 30. mars 2022

Tosað varð um, hvørji mál Eldraráðið serliga skuldi taka fram til fundin við borgarstjóran 30. mars. Julianna skal senda skránna til fundin til Marjuna Berg. Í fleiri førum er talan um endurtøkur (uppfylging) av málum, ið vóru til umrøðu á seinasta fundi við borgarstjóran í desember 2021.

AD 3 Góðkenning av fundarfrágreiðing frá seinasta fundi

Fundarfrágreiðing 2022-2 varð lisin og góðkend.

AD 4 Ymiskt

Í sambandi við Ráðstevnuna kom fram, at eitt betri og tættari samskifti eigur at vera millum eldraráðini í Føroyum. Tað sýnist at vera misskiljingar hjá summum kommunum um, hvørji rættindi eitt fólkavalt eldraráð hevur. Eisini eigur ein peningajáttan at fylgja við.

Nú Covid-19 er hasað av, eiga vit at fara undir tiltøk hóskvøld. Undirritaði setir seg í samband við Marius Rein um at leggja fyri við hugleiðingum um Havnina fyrr.

Semja var um, at Altjóða Eldradagur verður í Tórshavnar kommunu í heyst.

**Eldraráðið í Tórshavnar kommunu**
**Tórsgøta 21, 100 Tórshavn**
**eldrarad@torshavn.fo**

TÓRSHAVNAR
KOMMUNA

Skrivað tann 17. mars 2022.

Petur Rouch,
skrivari